# Tað er nú!

ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN



Tað er nú, vit skulu standa saman og í felag finna eina positiva loysn, hvussu vit koma víðari í hesu truplu tíð, sum Klaksvíkar Kommuna er komin sær í.

Vit sum minnast til 90´ini vita, hvussu hart kreppan rakti Klaksvíkina og alt Føroya land. Hvussu fleiri arbeiðsfólk hjá kommununi og virkjum vórðu send heim, tí nú var ikki brúk fyri teirra arbeiðsmegi longur, og kommunan hevði ikki pening til at gjalda arbeiðsløn.

Onki fólk var í býnum, Kósavirkið o.a. steðgaði upp og koyrdi tú ein biltúr, tá ferðslan plagdi at vera upp á tað mesta, so var alt steindeytt. Ein kundi blivið við, men tað mest umráðandi var og er, at vit reistu okkum aftur.

Klaksvíkar kommuna kom fyri seg aftur. Nógv av tí, sum hevði ligið og gapað og bíðað í fleiri ár, bleiv knappliga okkara stoltleiki her í býnum. So ganga nøkur ár, og vit eru aftur í kreppu. Kommunan manglar pening og trolarar eru lýstir á tvang.

Vit skulu tó royna at síggja positivt upp á framtíðina, tí býur okkara er væl meira ajourførdur enn áður. Tildømis kann nevnast

barnagarðspleygan ok

eldraøkið nógv betri, men okkurt manglar

Miðbýurin er vakur sunnan fyri útfyllingina, og veganetið í býnum er í góðum standi.

hava grundstykkir, soleiðis at klárt er at seta búgv

Norðhavnin er klár at bjóða fram.

Eisini hava vit arbeiðsloysisskipanina, sum er góð í neyðini.

Nú heimskreppan leikar í, rakar hettar sjálvsagt eisini vinnubýin Klaksvík. Men gloym ikki, at Klaksvíkar kommuna er klár at taka ímóti almennum stovnum. Spurningurin er, um tað ikki er komið hartil, at vit her norðuri skulu langa nevan í borðið og krevja sum minimum í fyrsta umfari fiskiveiðieftirlitið og vaktar og bjargingartænastuna til Klaksvíkar. Hetta er fiskivinnuhøvuðstaðurin í Føroyum, so tað er upp á tíðina, at vit fáa hesar stovnarnar norður.

Vit hava uppiborið at fáa almenn arbeiðspláss innan fyri fiskivinnuna hendanvegin, og Klaksvíkin er til reiðar at taka ímóti.

**Tryggleiki**

Tryggleikin hjá fólkinum skal í hásætið, og tá er tað umráðandi at tað fíggjarliga verður stýrt skilagott, og at sum mest fæst fyri hart vunnu skattakrónurnar.

Hettar kunnu vit ikki gera við at seta skattaprosentið upp, júst sum vit nú kappast við aðrar kommunur um skattaprosentið og at fáa fólk hendavegin. Nei vit skulu heldur bróta upp úr nýggjum og síggja møguleikarnar, vit klaksvíkingar hava. Eitt er heilt vist, tað megna vit bert vit vilja.

Spurningurin er so, um vit í fyrsta lagi ikki bert skulu royna at disponera betri við tí, sum vit hava, og fáa sum best burturúr. Vit kundu sett t. d. ein leiðsluráðgeva, sum hevur serkunnleika innan organisering soleiðis, at øll hava júst ta vitan, sum tey skulu hava fyri at arbeiða effektivt. Fleiri fyritøkur hava gjørt nýtstu av hesum við góðum úrsliti.

Tænasturnar hjá Klaksvíkar kommunu kunnu vit bjóða fram til aðrar kommunur, t. d. Eysturoynna. Hóast vit ikki hava lagt saman við Eysturoynni, ber til at samstarva og fáa væl burtur úr.

Um vit bremsa ov hart, skapa vit eina enn størri kreppu enn talan veruliga er um, tí tað eru fleiri dømir um.

Lat okkum ikki gevast at liva fyri tað, um vit hoyra um eina kreppu. Kreppurnar eru til at loysa. Um vit hyggja eftir gjøgnum tíðirnar, so hava vit klárað okkum ígjøgnum kreppurnar, og eru lopin longur upp eftir hvørja kreppu. So lat okkum vera positiv, hóast tað gongur okkum ímóti og útvikla tann kreativa partin fyri at koma víðari.

# Frítt tráðleyst internet í Havn

LEVI MØRK

valevni til býráðsvalið fyri Javnaðarflokkin



Hotspot-umráðir í Tórshavn, tráðleyst samband ymsastaðni í miðbýnum í Havn, hetta er til stóra gleði fyri allar borgarar, eisini til ferðafólk. Hetta kann so fíggjast gjøgnum lýsingar o.a. Eg vil gera mítt fyri, at hetta kemur ígjøgnum, um eg verði valdur inn til Tórhavnar býráð á valinum 11. novembur.

Eg fari eg, at endurgeva áhugaverda grein frá politikken, har m. a. Høje Taastrup kommuna, longu hevur fingið slíka tráðleysa skipan undur land, og aðrar kommunur í Danmark fylgja við, sí grein.

Endurgeving frá politikken, sí link http://politiken.dk/tjek/digitalt/internet/article559410.ece

Forestil dig, at du sidder og tjekker din Facebook-profil på- din mobiltelefon på vej til byen.

På Kgs. Nytorv popper der en reklame op i toppen af skærmen om, at der er tilbud i Magasin på de jeans, du lige står og mangler.

Du skynder dig at hoppe af for at købe dem og bevæger dig glad videre på din shoppingtur.

Sådan kan virkeligheden nemt se ud, hvis internetvirksomheden Gratis Danmark lykkes med deres projekt om gratis reklamebaseret trådløst internet på offentlige pladser og trafikale knudepunkter i alle landets kommuner.

Første kommune er allerede i hus. I løbet af efteråret vil borgerne i Høje-Taastrup kunne gå gratis på internettet, når de færdes på Taastrup Hovedgade, i indkøbscenteret City 2 og andre steder, hvor mange mennesker er samlet.

Nu er meget få ting som bekendt helt gratis og heller ikke i dette tilfælde. Som modydelse for den gratis netadgang må borgerne i Høje-Taastrup afgive de to øverste centimeter af skærmen til reklamer fra virksomheder og informationer fra kommunen.

**»Det er den vej tingene går«**

»Vi har sagt ja, fordi vi synes, at det er et rigtig godt servicetilbud til vores borgere og turister, at de kan komme gratis på internettet centrale steder i kommunen, og med udviklingen inden for pc'er og telefoner kan vi se, at det er den vej, tingene går«, siger Høje-Taastrups borgmester Michael Ziegler (K).

Kommunen har betalt Gratis Danmark omkring 250.000 kroner for oprettelse af otte såkaldte hotspots, hvor man kan koble sig på det trådløse net.

Idéen til Gratis Danmark er opstået hos Camilla Banja, direktør i NoPayNet, der sammen med netværksløsningsvirksomheden Butlernetworks står bag Gratis Danmark.

»Denne her forretningsmodel er først interessant økonomisk, når du har en vis volumen – enten gennem et geografisk område eller et segment som en havn for eksempel. Først der kan man målrette reklamerne og tjene penge på det. I begyndelsen var vi bare ildsjæle, der ikke tjente penge på det«, siger Camilla Banja.

**Viden er guld**

Vejen til målrettede reklamer er viden om brugerne, og kravet for at logge på Gratis Danmarks trådløse net er, at man oplyser sin alder, køn, nationalitet, foretrukne sprog og e-mail-adresse.

Derefter vil brugerne blive tilbudt mere båndbredde, hvis de opretter en »kommerciel profil«, hvor de fortæller mere om sig selv.

»På den måde kan vi bruge oplysningerne på de kommercielle profiler til at matche annoncørerne med potentielle kunder, men der er også mulighed for, at vi kan målrette nyheder fra medier eller servicemeddelelser fra kommunen til brugerne«, siger Camilla Banja.

Men ud over målrettede reklamer vil Gratis Danmark som de første herhjemme kunne tilbyde annoncørerne at sende reklamer ud på nettet, der er tilpasset det sted, hvor brugeren befinder sig geografisk.

»Det giver annoncørerne en unik mulighed for at lave geografisk specifikke annoncer, fordi vi har fat i brugeren, når han eller hun bevæger sig rundt«, siger Camilla Banja.

**Flere kommuner på vej**

Ifølge Camilla Banja ligger Gratis Danmark i forhandlinger med 35 kommuner om etablering af trådløse netværk og vil inden for de kommende par uger have lavet aftaler med de næste kommuner.

Gitte Stald, der har forsket i mobile vaner på IT-Universitetet, vurderer, at idéen om gratis trådløst internet i det offentlige rum rammer ned i en stigende efterspørgsel, men forudser ikke et decideret skifte i vores internetvaner her og nu.

»Der er formentlig en stigende interesse for hotspots, så man kan få informationer i det offentlige rum, men jeg tror ikke, at vi vil se en revolution – det er vi alt for pragmatiske til i Danmark. Men det vil måske pace udviklingen lidt, fordi det er gratis og tilgængeligt«, siger hun.

**Ikke godt nok til hjemmebredbånd**

Selv om der ifølge Gratis Danmark vil være enkelte boliger i meget tæt nærhed på en hotspot-zone, der også kan få gratis internetdækning på deres hjemme-pc, ryster de faste internetudbydere ikke i bukserne.

Kvaliteten af gratisudbydernes produkt er ikke god nok. Man vil ikke kunne se tv, spille spil og andre ting, der kræver stor kapacitet, mener Freenasp Mobedjina, administrerende direktør for Telia bredbånd. Endurgeving endar.

Ja her eru nógvir møguleikar í omanfyri nevndu grein. Td. Verður tað gott at logga seg inn á facebook og onnur støð meðan ein gongur sær ein túr Havn. Lat okkum vera við og frammanfyri onnur og fáa okkum tráleyst internet ymsa staðni í Tórshavnar kommunu.

# Gomlu Føroya Banka húsini – ein Virkis- og Trivnaðardepil fyri allar eldri borgarar í Tórshavnar kommunu

INGRID S. HENRIKSEN

Valevni til býráðsvalið – á lista C



Gomlu Føroya Banka húsini í Tórsgøtu í Havn eru hús, ið eru sera góð og hugnalig og eru húsini ogn hjá Tórshavnar Kommunu. Gerandisdagar verða húsini nýtt av Tilhaldinum til ymisk tiltøk fyri pensjónistar. Tilhaldið hevur opið í dagtímunum frá kl. 10 til 17 mánadag til fríggjadag. Eisini hevur Eldraráðið í Tórshavnar kommunu høli í húsinum.

Gomlu Føroya Banka húsini eru ein perla í miðbýnum í Havn, sum pensjónistar og pensjónistafelagsskapir í Havn eiga at kunna nýta til fulnar - eisini um kvøldarnar. Eyðsýnt er, at Tórshavnar kommuna eigur at syrgja fyri, at eldru borgararnir í kommununi kunnu gagnnýta gomlu Føroya Banka húsini í størri mun er gjørt verður í løtuni.

Á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu verður sagt, at eldrapolitikkurin hjá kommununi er grundaður á grundreglur hjá ST fyri eldri. Uppgávan hjá kommununi er einans at skapa karmar har hugni, trivnaður, menning og virðing fyri tí einstaka eru í hásæti. Karmar, ið eru soleiðis háttaðir, at øll fáa nýtt síni evni og førleikar. Karmar, ið eru við til at varðveita og menna sjálvræði og lívsgóðsku.

**Pensjónistafelagið í Havn**

Pensjónistafelagið í Havn hevur knapt 200 limir og er felag, sum seinastu 9 árini hevur havt fundir í Losjuni í Havn hvørt mikukvøld frá kl. 19 til uml. 22.30, har pensjónistar hittast at hugna sær, práta, binda, spæla kort, síggja film, møta til fyrilestrar, upplestur v.m. Tombola og bingospæl eru somuleiðis javnan á skránni.

Pensjónistafelagið í Havn rindar sjálvt helvtina av leiguútreiðslunum fyri fundirnar í Losjuni og Tórshavnar kommuna rindar hina helvtina av leiguútreiðslunum. Parturin hjá pensjónistafelagnum liggur millum 12.000 og 13.000 kr. árliga. Sum er verður henda hølisútreiðsla í stóran mun fíggja við tombola og bingospæli.

Vanliga møta millum 30-50 fólk til mikukvøldsfundirnar/samkomurnar hjá Pensjónista-felagnum í Havn.

**Eldrapolitisk tiltøk og gomlu Føroya Banka húsini**

Í tráð við ST-grundreglurnar fyri eldri, har sum nevnt áður verður sagt, at almennir myndugleikar eiga at skapa rammur um trygd og trivna hjá eldri borgarum, eigur Tórshavnar kommuna at stuðla pensjónistafelagsskapum og eldrafelagsskapum í størri mun enn gjørt verður í løtuni. Tórshavnar kommuna eigur at bjóða pensjónistafelagsskapum tilboð um ókeypis innivist í gomlu Føroya Banka húsunum, á líkan hátt sum kommunan letur Tilhaldinum ókeypis innivist í dagtímunum.

Verðið eg vald í býráðið fari eg at virka fyri at Pensjónistafelagið í Havn og møgulig onnur eldrafeløg fáa høvi at nýta hølini í gomlu Føroya Banka húsunum í kvøldtímunum frá t.d. kl.19 til 22 gerandisdagar, og í vikuskiftunum, tá onki virksemi er í húsunum. Virksemi, sum eldrafeløgini sjálvi skulu standa fyri og stýra. Fari somuleiðis at virka fyri at betra atgongdina til húsini – kommunan má syrgja fyri at lyfta verður sett upp.

Útvegar kommunan slíkum pensjónistafelagsskapum góðar karmar fyri virksemi sínum, fer hetta óivað at hava við sær, at enn fleiri pensjónistar enn nú aktivt fara at brúka gomlu Føroya Banka húsini til fjølbroytt eldratiltøk. Eldrapolitisk tiltøk ið styrkja virkisfýsni, sjálvræði og trivnað hjá mongd av pensjónistum.